## NØVN Í VIKUNI

# Reyni brøður fimmti



Týsdagin 31. juli fóru tvíburðarnir Eyðun og Árni av Reyni um tey hálvt hundrað. Teir eru báðir kendir havnarmenn og partar av býarmyndini. Eyðun er listarmaður, og Árni er lærari.

Foreldrini eru Elsa og Ingálvur av Reyni. Elsa, sum nú er pensionerað sjúkrasystir, er úr Skemmuni í Porkeri, og Ingálvur er havnarmaður – ein av trimum synum hjá Kristinu og Jens av Reyni.

Eyðun og Árni eru úr systkinaflokki upp á átta. Systrarnar eru Gunnvør, Ása og Inga, og beiggjarnir eru Kári, Heri og Ingi, sum fyri ikki so langari tíð síðani varð tikin foldum frá. Heimið hjá Elsu, Ingálvi og børnunum var mitt í býnum – á Ingutrøð.

Árni, sum býr í Hoyvík, var sum ungur í handverkaralæru hjá Peturi í Gong. Seinni tók hann hf prógv í Hoydølum, og so fór hann á læraraskúlan, hagani hann leyk prógv í 1984. Síðani tá hevur hann verið lærari í Hósvík.

Árni hevur verið nógv uppi í sangi og musikki. Hann er góður urgu og klaver spælari, og hann hevur undirvíst nógv í spæli. Tað er eingin ivi um, hvagani hann hevur kláru og reinu tenorrøddina. Tað hava fleiri kór – fyrst og fremst sangkórið í Ebenezer – notið gott av, og ikki minst í tí frálíku dupult kvartettini í Ebenezer er hann hollur.

Árni hevur stóran áhuga fyri tí farna – ikki minst Havnini og havnarfólkum. Í 1993 gav hann á egnum forlagi út bókina Havnin um aldarmótið, sum abbin, Jens av Reyni, skrivaði.

Eyðun er giftur við Bjørg Øssursdóttir í Havn. Tey eiga tvær døtrar – Duritu og Ingibjørg. Sum heilt ungur var Eyðun til skips, og áðrenn hann fór undir útbúgving innan listina, lærdi hann til bilmekanikara hjá farbróðrinum, Sigird av Reyni.

Í 1971–72 var Eyðun næmingur á Askou–Jensens tekniska skúla í Keypmannahavn og frá 1972 og til 1978 var hann á málaraskúlanum á listaakademinum hjá Wilhelm Freddie. Eftir at hann var komin heimaftur úr Danmark, og áðrenn hann burturav fór at fáast við listina, arbeiddi Eyðun í fleiri ár í svimjihøllini í Gundadali.

Eyðun hevur saman við Amariel Norðoy og Kára Svensson málaraskemmu í gomlu bommfabrikkini hjá Frants Restorff. Um málningarnar hjá honum sigur Bárður Jákupsson soleiðis í Myndlist í Føroyum:

Málningarnir eru komponeraðir við sterkum litum og stórum pensilsstrokum í einum myndamáli, ið abstraherar frá myndevninum. Ein nýromantiskur litdámur eyðkendi tær stóru hugbráðu komposisjónirnar í 1980árunum. Í 1990 árunum hevur hann loyst seg frá koloritti og tí figurativa og fingið eitt gjøgnumbrot sum abstraktur málari. Men tey seinastu árini hevur hann aftur í størri mun undirstrikað sambandið við tað ítøkiliga myndevnið – linjur, rørslur og flatar sipa til veggir, galvar og skjøldrar á húsum. Ein linja og ein litur kunnu bákna væðing og kvøldroða. Svartir og violettir litir eru klangbotnur undir sterkum reyðum, grønum, bláum og gulum litbrigdum.

Eyðun hevur góða sangrødd, og hann er spentur í ítrótti. Sum hjá teimum flestu, ið eru uppvaksin á Ingutrøð og í økinum har í kring, er hann íðin B36ari.

# Tøkk



Eina hjartans tøkk vilja vit siga tykkum, sum vístu okkum samkenslu og hjálpsemi í stóru sorg okkara, tá elskaði sonur okkara

**Pauli Holmsund**
**Kambsdalur**

so brádliga varð tikin frá okkum.

Tøkk fyri blómur, kransar, peningagávur, heilsanir og telefonuppringingar.
Tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Foreldrini**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá elskaða kona mín, góða mamma, vermamma, omma og systir okkara

**Bodil Tausen**
**Tórshavn**

so brádliga varð tikin frá okkum.

Tøkk til øll tykkum, sum stuðlaðu og hjálptu til á ymiskan hátt. Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Meinigheitshúsið, og tøkk øll tit, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Fyri tey avvarðandi*
**Klæmint**
**Hans, Jensina og Halda við familjum**

# Tøkk

Takk fyri sýnda samkenslu, tá elskaði pápi, verpápi, abbi, beiggi og svágur okkara

**Eyðun Poulsen**
**Tórshavn**

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, vitjanir og uppringingar og takk øll tit, sum hjálptu til.
Eisini takka vit tykkum øllum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstaðs.

**Bjørg, Bárður, Helgi og Hanna**

# Tøkk



Øllum tykkum mongu, sum við blómum, gávum, telegrammum, uppringingum og á annan hátt mintust meg 21. juli, og gjørdu 50 ára føðingardagin ógloymandi, takki eg hjartaliga. Eisini vil eg nýta høvið til at takka starvsfeløgunum á posthúsinum í Saltangará og øllum, sum búgva á postrutu 4 (Oyndarfjarðarrutuni), fyri avbera gott samstarv og vinarlag, nú eg 1 august hevði 30 ára starvsdag.

Bestu heilsanir,

**Kári P. Højgaard**

# Dan 55 ár



Í morgin fyllir Dan Reinert Petrersen, løgtingsmaður í Fuglafirði, 55 ár.

Dan er ættaður úr Saltnesi, Sonur Dáva og Ninnu Petersen. Reinert navnið hevur hann frá mammuni úr Kaldbak.

Dan er útbúgvin lærari. Hann tók læraraprógv á Haslev Seminarium í 1972.

Siðan hann komaftur til Føroya, hevur hann verið lærari í Klaksvík, á Tvøroyri og í Runavík. Flestu árini - síðan 1975 - hevur hann verið lærari í Runavík.

Tó hevur hann havt farloyvi einar tvær ferðir, meðan hann hevur verið til skips.

Á valinum í 1998 varð hann valdur á ting fyri Javnaðarflokkin í Eysturoy. Ikki tí at tað var heilt nýtt fyri honum. Hann hevur sitið sum eykamaður fyrr.

Hansara politiska hugsjón er ikki júst komin heimanífrá, uppvaksin sum hann er í støðuføstu sambandvøgguni í Saltnesi, sum hann sjálvur plagar at siga.

Eisini plagar at dáma honum at arga politisku mótstøðumenninar á sjálvsstýrisveinginum við, at tað var í grundini eisini í Saltnesi, at vøggan hjá føroysku sjálvsstýrisrørsluni stóð. Tí, sum hann er vanur at siga, so var tað abbabeiggin, Fríðrikur Petersen, próstur, ið sum lærari í Kirkjubø legði grundina undir tann partin av okkara politisku søgu.

Dan Reinert Petersen hevur í sínum politiska virki víst stóran áhuga fyri norðurlendskum samstarvi, og hevur hann eisini seinnu árini umboðað Føroya Løgting í Norðurlandaráðnum. Hann varð afturvaldur sum fast umboð Í Norðurlandaráðið, nú Løgtingið kom saman aftur eftir ólavsøku.




